# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Forsetaskifti í ÍSF

Forseti ÍSF gjøgnum mong ár Heðin Mortensen hevur sum kunnugt lagt frá sær og nýggjur forseti, Sølvi Reinert Hansen, er valdur. Heðin Mortensen hevur gjørt eitt stórt arbeiði sum fremsti talsmaður fyri føroyskan ítrótt. Hann hevur gjørt ÍSF sjónligt og hann hevur megnað at skapa virðing og viðurkenning kring ítróttasambandið. Ótroyttiliga hevur Heðin virkað fyri større fatan og og betri sømdum fyri føroyska ítrótt og hann hevur verið ein bæði virdur og vælumtóktur forseti. Hann var meira ella minni vorðin eitt við ÍSF.

Nú verður tað so heilt annar persónur, sum skal standa á odda fyri ítróttini. Tað verður eingin løtt uppgáva at lyfta arvin eftir Heðin. Hinvegin er nakar førur fyri hetta, so er tað júst Sølvi Reinert Hansen. Sølvi hevur í mong ár virkað sum rágevi innan ÍSF. Hann hevur verið við til heimligar so væl sum altjóða samráðingar og hann hevur serstakliga havt áhuga fyri ungdóminum og er upptikin av spurningum sum rekruttering, útbúgving og altjóða samstarvi. Hóast hann sostatt kann tykjast vera partur av verandi valdsbygnaði innan ÍSF, so skal ein ikki rokna við, at alt fer at verða verandi, sum tað hevur verið innan ÍSF. Alt bendir á, at nýggi forsetin fer at koma við broytingum, sum ivaleyst eru fyri neyðini.

Til hetta starv hevur Sølvi Reinert Hansen góðar fortreytir. Hann er vælskúlaður, og hóast stillførur, sannførandi og væltalandi, tykist hann hava gjørt sær greiða mynd av føroyskari ítrótt og føroyskum ítróttarpolitikki í framtíðini. Sølvi umboðaði ÍSF í tí bólki, sum orðaði visjiónina fyri mentan, sum eisini fevndi um ítróttina. Fyri Sølva er ítrótt sálvsagdur og týðandi partur av mentan okkara. Her var hann soleiðis við til at orða málini fyri framtíðar ítróttarpolitikki, nevniliga, at ítrótt er fortreyt fyri trivnaði og menning borgarans og hevur týdning fyri fólkaheilsuna.

Lunnar skulu verða lagdir undir eina framhaldandi menning av ítróttini í nær- og fjarumhvørvinum. Í 2015 skulu fjøltáttað og mennandi ítróttatilboð vera til øll og útbúgvingartilboð skulu vera til føroysk og útlendsk ítróttafólk- og leiðarar. Føroyar skulu tá vera vorðnar sjónligar í altjóða ítróttasamstarvinum, taka ábyrgd og hýsa altjóða tiltøkum. Føroysk ítrótt og ítróttafólk eru eftirspurd í altjóða ítrótti og ítróttin hevur týdning fyri landsins búskap. Tað er sostatt ein stór ábyrgd Sølvi hevur átikið sær, sum setur stór krøv ikki bert til nýggja leiðaran men til alla leiðsluna í ÍSF og til leiðslurnar í øllum sersambondum. Vit ynskja honum góða eydnu við starvinum við vónini um gott samstarv við fjølmiðlarnar.

**Sosialurin**

## Háðan av einum fakbólki



**JÓHANNA KØTLUM**
forkvinna í Almanna-og heilsurøktarafelagnum

**Aftursvar til tað etiska ráðið hjá sjúkrarøktarfrøðingum**

Um tit ynskja ein ella fleiri flokkar av sjúkrarøktarfrøðingum er ikki neyðugt at niðurgera ein annan fakbólk.

Vit hava sama áhugamál, tað at vera um sjúk og veik fólk, og geva borgarunum ta bestu røktina.

Vit áttu at staðið lið um lið, og havt eitt tvørfakligt samstarv.

Nøkur velja útbúgvingina til sjúkrarøktarfrøðing og onnur velja heilsurøktara.

**Háðan av einum fakbólki**

Ferð aftan á ferð hoyrist og lesast kann, at um ikki sjúkrarøktarfrøðingar við bachelor útbúgving passa sjúklingarnir, viðførir tað, at innleggingartíðin økist, fleiri komplikatiónir veðra, og deyðiligheitin økist.

Tit vísa á, at ein ørgrynna av kanningum úr Amerika og Stóra Bretlandi stuðla hesum pástandinum. Tað er grovur pástandur, og tað eggjar ikki fólki at søkja inn á heilsuskúlan. Mær vitandi hava tey eitt annað heilsuverk, og kann tí ikki samanberast við heilsuøkið og útbúgvingarnir her hjá okkum. Hevði tað etiska ráðið borið seg rætt at, so áttu tær, áðrenn tær koma við so grovum pástandum, at víst til kanningar har bæði heilsuverk og útbúgvingarstøðið, kann samanberast við okkara. Mær vitandi er tað vit best kunnu samanbera okkum við heilsuverkið í norðurlondum.

Hvat er ætlanin hjá tykkum? Ætla tit at máa støðið undan heilsuskúlanum, soleiðis at tað bert vera sjúkrarøktarfrøðingar á bachelorstøði í røktini?

Nakrar av kanningunum tit vísa til, eru kanningar sum systirfakfeløg hjá tykkum standa fyri. Tí kann hugsast, at hesar stuðla tykkara áhugamálum.

Eitt av okkara áhugafeløgum, sum er FOA www.foa.dk gevur blað út, har mann kann lesa eina ørgrynnu av lesnaði um, hvussu sosial- og sundhedsassistentar (í Føroyum heilsurøktari), verða gagnnýttir til fulnar á nógvum økjum. Tær fáa fakliga viðurkenning fyri tað megnar arbeiði tær útinna.

**Fakliga viðurkenning**

Tá tosað verður um røkt, verður oftast tosa um sjúkrarøktarfrøðingar, alt gott um tað.

Tað eru tó eisini onnur sum luttaka í røktini, og vit hava øll tørv á fakligari viðurkenning. Sum dømi vil eg vísa á Barakkina á LS, eisini nevnd pleygudeildin og E2/E3 ”kært barn har mange navne”. E3 var ein sera góð uppvenjingar deild fyri heilaskødd, ein apopleksi deild. E2 var ein røktardeild, har ið fleiri røktarstarvsbólkar starvast lið um lið. Millum annað var ein stórur partur av stápinum sjúkrahjálparar. Tær vóru gagnnýttar til fulnar og teirra partur lá ikki eftir.

Tá sparingar vórðu framdar á LS fyrst í hálvfemsunum, vóru tað mest sjúkrahjápararnar, sum máttu lúta. Tað meini eg, var ein stórur missur fyri LS.

**Samanlegging av fleiri fakbólkum**

Sjúkrahjálparar, pleygarar, ítrivsvegleiðarar og røktarheimsasistentar eru útbúgvingar mann hevur valt at leggja saman í tær nýggju útbúgvingarnar, sum nú eru heilsuhjálparar og heilsurøktarar.

Um mann frammanundan hevur ein av teimum nevndu útbúgvingunum, og velur at fáa sær heilsurøktaraútbúgvingina, kann hon takast upp á styttri tíð í Danmark.

**Góðkenna ta gongdina sum verður**

Tað er sera gott at vit hava fingið ein landsstýrismann í almanna- og heilsumálum sum sær allar røktarstavsbólkarnar, og ætlar at teir vera gagnnýttir til fulnar.

Vit hava fingið ein heilsuskúla í Suðuroy, sum útbúgvir heilsuhjálparar og heilsurøktarar, og í Føroyum eru færri av røktarstarvsfólkum enn í okkara grannalondum, so skilagott hevði verið at fingið fleiri inn til útbúgvingarnar. Bæði sjúkrarøktarfrøðingar, heilsurøktarar og heilsuhjálparar.

## Djúpt sakk FSF

**JØRGIN EVALD SOLMUNDI**

Nú fall avgerðin um at Bartal skal hava 2 dagar leikbann fyri nakað, sum er burtur úr vón og viti.

Lat meg gera púra greitt, at tað sum Bartal segði kemur undir ongum umstøðum undir ósømiligan atburð, tí tað sum hann segði var bara tað, at hann ikki dugdi at floyta, renna og at hann gjørdi sær fyri skommum. Er tað ósømiligt, so kann mann einki siga í hesum landinum. Tí veruleikin er tann, at vit hava fingið við ein felagsskap at gera, sum er farin at diktera fólki, hvat talifrælsið er og ikki er. Tí tað sum hendir í Føroyum í dag, er at mukkar mann ímóti hasum monnunum, so fært tú sleggina í høvdið, tað er prófast, hendir hettar aftur, so fáa tit av at vita, verið vísir í tí. Sum støðan er nú, kunnu vit bara úttala okkum um tað er í samsvar við teirra hugsan altso innanfyri bøgarðarnar hjá FSF, fert tú útum, so verður tú sligin í høvdið so einfalt er tað. Orsøkin til tað er, at FSF, dómarafelagið og dómaranevndin hava útvikla seg til at vit í Føroyum nú hava fingið eitt nýtt prestastýri og eina hernaðarjuntu, sum vit so væl kenna tað frá Iran og Nyanmar og tað eru allir føroyingar longu nú greiðir um, men eitt kann eg upplýsa fyri hesum stýrinum, at eg ætli mær til eina og hvørja tíð at gera mína hugsan galdandi í hesum landi uttan at spyrja tykkum og onnur eftir og eg ætli mær eisini til eina og hvørja tíð at vera talifrælsið hjá leikarum, venjarum o.ø. Tað er líka mikið hvat felag teir hoyra til, so er tað vónandi komið uppá pláss fyri tykkum einaræðisharrum. Tað einasta, sum nú er at gera, sum eg síggi tað, er at fólk fara at gera uppreistur ímóti Sveini, Karl, Niklas, Niclas og Rúna og hvussu teir so enn eita. Tí frá nú av mugu vit seta hettar stýrið uppá pláss, so at teir fáa at vita, hvad se hør og bør, tí hendan óhugnaligan gongdin má og skal støðgast her og nú.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.